GÍ-VB 1-1 (0-0):

GÍ misti í seinastu løtu

Gøtumenn mistu eitt týðani fet í oddastríðnum, tá VB í seinastu løtu av dystinum fekk brotsspark

FÓTBÓLTUR
Jákup Mørk

Tá vágbingar í fjør vitjaðu í Gøtu, var talan um ein dyst, sum hevði alstóran týdning fyri, um tað skuldi eydnast vágbingum at vinna fyrsta meistaraheitið í søgu felagsins.

Sunnudagin vóru leikluturnir býttir um. Tó at talan ikki á nakran hátt er um møguleikan fyri fyrsta FM-heitið til GÍ, so hevði dysturin alstóran týdning í oddastríðnum, har GÍ og B36 kapprenna um fremsta sessin, nú fýra umfør eru eftir at leika í bestu deildini.

Predrag Zivkovic og hinir í VB royndu at trýsta seg longur niðan, eftir at GÍ var komið á odda, og at enda eydnaðist teimum eisini at fáa brotsspark og harvið javnleik

Mynd: Jonhard Hammer

Opin dystur

Fyrstu løtuna av dystinum var tað tó líkt til, at tað vóru vágbingarnir, sum vóru oddalið, tí frá fyrstu løtu av, vóru tað teir, sum í nógv størri mun søktu á GÍ málið.

Møguleikar spurdust eisini burturúr, og millum annað hevði Kryztof Popczynski eitt skot úr átta metra fjarstøðu, sum brast í stólpan og út aftur í spælið.

GÍ kom tó hampuliga skjótt á rætta lagið, og eisini teir høvdu sínar møguleikar. Teir báðar størstu hevði Helgi L. Petersen, men fyrst hevði Bjarni eina framúr góða bjarging, tá Helgi royndi seg við skoti úr stuttari fjarstøðu, og seinni var Bjarni aftur á staðnum, tá Helgi royndi seg við stútara.

Avgerandi avgerðir

Í seinna hálvleiki helt dystargongdin frá fyrra hálvleiki fram. Spælið úti á vøllinum var hampuliga javnt, men tað vóru framvegis vágbingarnir, sum høvdu tær vandamiklaru atsóknirnar. Serliga Birgir Jørgensen hevði nakrar heilt góðar møguleikar, har í øllum førum ein kann roknast fyri ein rættur stjóri, men í málið vildi bólturin so ikki.

Gøtumenn svaraðu tó eisini aftur, og teir vóru alt annað enn nøgdir um, at linjudómarin veittraði fyri rangstøðu, tá Henning Jarnskor stútaði í netið, eftir at Janik hevði brotið ígjøgnum í borðinum, fyri síðani at leggja innfyri. Helst varð flaggið havt á lofti, tí Óli Hansen var rangstaddur í teirri støðuni, so heldur ikki tá fekst mál burturúr.

Tá gøtumenn so endiliga fingu lagt seg á odda, vóru tað tó vágbingarnir, sum mótmæltu dómaraavgerðini, sum førdi til málið.

Hans Pauli Petersen royndi at sleppa framvið Jóan Paula Olsen í VB brotsteiginum. Vágbingarnir vildu vera við, at Jóan Pauli bara var fyrri maðurin á bóltinum, men tá Hans Pauli datt, peikaði dómarin á brotssparksblettin. Vágbingar vóru í øðini, og sum skilst á lagnum, hevði einki forgjørt verið í, um fleiri gul kort vórðu havd á lofti fyri ógvusligu mótmælini, men har kom so einki annað enn munnligar ávaringar.

Hvussu var og ikki, so var Henning Jarnskor ósvikaliga tryggur, tá hann skeyt úr 11 metrum, og so skuldi GÍ bara verja seinasta korterið.

Aftur brotsspark

Vágbingar royndu, sum vera man, at leggja trýst á hesar seinastu fimtan minuttirnar. Heilt vandamikið gjørdist tað tó ikki, fyrr enn vísarin var farin væl um teir 90 minuttirnar, og hesa ferð vóru tað gøtumenn, sum vóru í øðini.

Magni Jacobsen sendi ein langan bólt fram í brotsteigin, og tá Krzyztof royndi at fáa fatur á, varð Bartal Eliasen dømdur fyri at skumpa pólverjan í ryggin, soleiðis at vágbingar nú eisini fingu loyvi at royna seg úr 11 metrum.

Sum skilst úr Gøtu, so eru fólk ymisk á máli um, hvussu rættvíst hetta seinna brotssparkið var. Onkur helt, at dómarin helst royndi at kompensera fyri brotssparkið, sum hann hevði givið GÍ fyrr í dystinum, men alt hetta tóktist tó ikki at nerva vágbingarnar. Kryztof tókm sær sjálvur av brotssparkinum, og við seinasta sparkinum í dystinum, sendi hann í meskarnar.

Tað tykist sum lagnunnar speisemi, at Krzyztof skuldi skora móti gøtumonnum. Leysasøgur ganga um, at pólverjin skal spæla við GÍ komandi kappingarár, og um so er, var mál hansara kanska ein forðan fyri luttøku í europeisku meistarakappingini komandi ár.

Tað skal tó leggjast afturat, at enn er hetta heldur ikki meira enn leysasøgur. Sunnukvøldið hittu vit formannin í GÍ, Svenn Olsen, á máli, og hann segði seg einki kenna til, at Krzyztof skal spæla við gøtumonnum komandi ár.

Eitt sprell afturat

Við javnleikinum mistu gøtumenn at síggja til eitt sera týdningarmikið stig í oddinum, har B36 nú er fimm stig undan, tó at havnarmenninir hava leikt ein dyst fleiri.

Hetta setur tó krav um, at skulu gøtumenn gera sær vónir um gullmerkini, skal B36 í øllum førum tapa ein dyst, samstundis sum gøtumenn vinna allar sínar dystir.

Akkurát hvar B36 skal missa síni stig, kann sum so gera gøtumonnum tað sama, men eftir dystin sunnudagin vóna teir helst, at vágbingar kunnu gera okkurt sprellið á seinasta leikdegi. Tá kemur B36 á vitjan í Vági, og sum støðan á stigatalvuni er í løtuni, so skulu vágbingar helst vinna hendan dystin, um teir eisini skulu fáa atgongd til Europa komandi ár.

GÍ-VB 1-1 (0-0)

1-0: Henning Jarnskor (br.) 75
1-1: Krzystof Popczynski (br.) 90

Dómari: Lassin Isaksen (KÍ)

GÍ: Hallur Hansen – Bartal Eliasen, Pól Ennigarð, Leivur Hansen – Poul Henning Jacobsen, Zdzislaw Janik, Magni Jarnskor, Jóan Petur Olsen, Henning Jarnskor – Helgi L. Petersen, Óli Hansen

VB: Bjarni Johansen – Predrag Zivkovic, Eyðun Jacobsen, Magni Jacobsen – Palli Augustinussen, Marek Vierzbicki, Michael í Lágabø, Krzystof Popczynski, Jón Pauli Olsen - Robert Cieslewicz, Birgir Jørgensen

HB-Sumba 1-1 (1-0):

HB vónin viknar

HB misti aftur stig um vikuskiftið, og eru nú niðri á einum fimta plássi

2. DEILD
Jákup Mørk

Fyri bert tveimum vikum síðani, var fótbóltslagi av tí besta á 2. deildarliðnum hjá HB.

Liðið var tá á odda í deildini, og tos um heiðursmerki, og kanska enntá úr gulli, var at hoyra millum leikararar.

Í dag er støðan tó heldur tó øðrvísi. Tosað verður kanska framvegis um heiðursmerki, men hesi verða neyvan úr gulli, og í øllum førum skal betrast um úrtøkuna á vøllinum, um so skal verða.

Høvdu allar møguleikar

Leygardagin tók HB móti Sumba, sum í sín part hevur havt eitt rættiliga vónbrótandi kappingarár.

Hetta sá heldur ikki út til at batna leygardagin, tí bert fáir minuttir vóru leiktir, tá HB hevði lagt seg á odda. Ingi Rasmussen spældi djúpt til Eyðun Samuelsen, og av fimm-metra hornin bankaði álopsmaðurin bóltin upp undir nettakið.

Hóast talan ikki var um nakra veruliga leikliga yvirvág, so hevði HB hópin av møguleikum til at avgera dystin næstu løtuna. Ikki minst høvdu teir báðir, Eyðun Samuelsen og Gunnar Mohr, sínar møguleikar, men líka mikið hvussu teir so royndu, so vildi bólturin ikki inn um mállinjuna.

Eisini í seinna hálvleiki helt hendan gongdin fram. Ta einu ferðina eydnaðist Eyðuni at fáa bóltin fram við málverjanum, men í evstu løtu kom ein sumbingar skreiðandi inni a strikuni, sog so var tann vandin av.

Tað var tó líkt til, at talan skuldi gerast um ein tepran heimasigur, men brádliga fekk Sumba eitt mál mest sum burtur úr ongum. HB misti á veg í álop, og eftir at sumbingarnir høvdu spælt seg niðan eftir vøllinum, endaði alt við, at Rene Thomsen smekkaði til úr 20 metrum, og brádliga var javnleikur á máltalvuni.

Takk fyri seinast

Við javnleikinum fingu sumbingar á ein hátt takkað fyri seinast. Tá HB vitjaði í Sumba, var tað neyvan rættvíst, at teir fingu stig við sær, og í so máta mundi javnleikurin kennast søtur hjá sumbingum, sum tó ikki kundu nýta stigið til serliga nógv.

Hinvegin høvdu HB-leikararnir alstóran tørv á stigum. Liðið er nú dottið aftur á fimta plássið á stigatalvuni, so í løtuni røkist ikki fyri heiðursmerkjum. Teir eiga tó framvegis møguleikan at avgera sjálvir, tí komandi vikurnar hava teir dystir móti bæði B36 og TB og fæst full úrtøka úr hesum, verður medaljutosið aftur aktuelt.

HB-Sumba 1-1 (1-0)

1-0: Eyðun Samuelsen
1-1: Rene Thomsen

B68 heldur í bronsuni

Endiliga eydnaðist tað hjá Marcello at skora, men avrikið á Svangaskarði var ikki serliga sannførandi

FÓTBÓLTUR
Jóannes Hansen

Toftamenn eru boysnir. Síðani teir í áttanda umfarinum taptu 2–0 í Gøtu hava teir fingið fult hvøja ferð burtursæð frá tá teir vóru í Vági. Tá endaði tað við javnleiki.

Sunnudagin var uppgávan torfør. Tað tóktust teir vita á Toftum. B68 vann, men tað var alla tíðina spennandi. So tepur leiðsla er lítið at halda um, og hóast EB/Streymur ikki var so málsøkjandi í 2. hálvleiki, so lúrdi møguleikin alla tíðina fyri, at tað skuldi eydnast teimum at fáa javnleikin, sum teir vóru komnir eftir.

Einasta málið kom miðskeiðis í 2. hálvleiki, og talan var um eitt sera vakurt mál. Heimaliðið royndi alla tíðina at spæla tolið og at toga spælið heilt út í síðurnar. Tað eydnaðist við hvørt, men trupulleikin var, at ofta vóru sendingarnar ikki nóg nevyar.

Í álopsmyndingini, sum í síðsta enda bar sigursmálið við sær, riggaði tað heilt væl. Sjøtul varð settur á aftarlaga í vinstru, so varð spælt diagonalt. Jákup Eli Olsen dró eitt sindur inn, Messias, sum var sera sannførandi í miðverjuni, yvirlappaði, innleggið skrúvaði eitt sindur frá málinum, og við handara stólpan tveitti Marcello seg fram og stútaði inn um Gunnar á Steig, sum annars stóð seg væl.

Einki var at undrast á, at málskjúttin hevði ilt við at reisa seg aftur. Tað mundi vera ein øgiligur lætti hjá honum. Í fjør var Marcello alla tíðina væl upplagdur, og hann skoraði eina rúgvu av málum. Í ár hevur ikki gingið væl. Tær seinastu ferðirnar hevur hann ikki verið ímillum teir fyrstu ellivu, og so fekk hann eitt fínt mál.

Ágangandi

Tað var kanska roknandi við, at EB/Strymur fór at koma á Svangaskarð fyri at liggja aftarlaga á vøllinum og dúva upp á møguleikan fyri kontraálopum.

Bergur Magnussen er snúðin. Í staðin fyri at gera, sum tað varð roknað við, so var EB/Streymur framrættað og ágangandi fyrstu løtuna. Og tá var tað, at teir vóru næst við at fáa mál.

Sorin Anghel er ein fínur álopsspælari. Tað hevur hann víst aftur og aftur, og tað vísti hann aftur hesa ferð. Tíðliga hevði hann eitt gott langskot, sum Kjartan Nesá noyddist at benda út til horna, og miðskeiðis í fyrra umfarinum sneiddi hann fleiri av, áðrenn hann úr seytjan metrum og eitt sindur til vinstru sendi flatt og dygst framvið handaru stólparótini.

Í 2. hálvleiki var EB/Streymur meiri í leiklutinum, sum teir plaga at vera í. Onkra ferðina vóru teir skjótir fram við fleiri spælarum, eftir at teir høvdu steðgað B68 álopum, men teir komu ikki nærri enn nær við og næstan.

Frøin var stór á Marcello, tá hann endiliga aftur slapp at royna seg sum málskjútta hjá B68

Opnaðu síðurnar

B68 megnaði ikki at vísa støðugt og gott spæl. Fróða Benjaminsen er týdningarmiklasti maðurin í framrættaða spælinum. Tað sást eisini hesa ferð, men ikki so væl, sum tað ofta hevur gjørt. Knút Vesturtún lá so at siga alla tíðina tætt í landsliðsmanninum.

Hans Fróði Hansen stýrdi verjuni væl, og so royndu toftamenninir aftur og aftur at koma ígjøgnum í borðunum. Í 1. hálvleiki eydnaðist tað ikki so ofta, men í 2. hálvleiki var tað lættari.

Arnold Joensen breyt fleiri ferðir ígjøgnum aftarlaga á EB/Streyma hálvuni, hann kom til baklinjuna, men einki kom burturúr innleggunum.

Síðstu løtuna kom Kristian Poulsen í álopið í staðin fyri Marcello. Fyrrverandi unglingalandsliðs spælarin hevur verið skaddur alt hetta kappingarárið, og í fjør var hann eisini darvaður nógv av skaðum.

B68: Kjartan Nesá – Oleif Joensen, Hans Fróði Hansen, Messias Perreira – Jann Ingi Petersen, Arnold Joensen, Fróði Benjaminsen, Jan C. Dam, Jákup Eli Olsen – Súni Fríði Johannesen, Marcello Marcellino

EB/Streymur: Gunnar á Steig – Jákup Martin Joensen, Andrzej Pacek, Ólavur Poulsen, Alfred Jacobsen, Esmar Eiðisgarð – Ronnie Samuelsen, Knút Vesturtún, Eyðfinnur Joensen – Jón Sigurd Gleðisheygg, Sorin Anghel

GÍ – B36 2-6 (2-2)

B36 hevur samband við oddin

Við einum sigri í Gøtu fekk B36 vent tí vánaligu gongdini í 2. deild og hevur nú aftur samband við oddaliðini. GÍ er í álvarsomum vanda fyri niðurflyting

2. DEILD
Jákup Mørk

Hóast GÍ var á odda tvær ferðir í fyrra hálvleiki, so megnaði B36 kortini at vinna sannførandi, tá samanum kom. Sigurin hjá útiliðnum var uppiborin, hóast fyrri hálvleikur var javnur, og bæði liðini søktu at málunum hjá mótpartinum.

Við sigrinum hálaði B36 seg tvey pláss uppeftir til triðja pláss á stigatalvuni, meðan GÍ enn er rótfest í botninum.

GÍ legði hart út

Tað var annars GÍ, ið legði harðast út í dystinum. Hans Erik Danielsen legði GÍ framum tíðliga í dystinum, men Heðin Joensen svaraði skjótt aftur. Hann var spældur djúpt og dróg framvið einum verjuleikara, áðrenn hann sendi framvið málverjanum.

GÍ kom tó aftur framum. Málverjin hjá B36 misti eitt innlegg, sum datt fyri føturnar á pólverjanum Marek Wiegel, ið hevði lætt við at senda í málið.

Tað eydnaðist tó havnarmonnum at javna fyri hálvleik. Bólturin varð snittaður víðari til Ragnar Poulsen, ið skoraði trygt.

Í seinna hálvleiki var tað tó B36, ið stýrdi øllum, sum fór fram á vøllinum. Fyrst var tað Tórálvur Poulsen, ið legði B36 framum fyri fyrstu ferð í dystinum. Hann trýsti ein verjuleikara, so at afturleggingin gjørdist vánalig, og síðani vann hann bóltin av málverjanum og legði bóltin í netið.

Helgi Justinussen gjørdi tað til 4-2, tá honum varð bjóðað eitt opið mál, Páll Horn økti til 5-2 og Mortan Johannesen sló sigurin fastan við síðsta málinum til 6-2.

B36 við aftur

B36 hevur vunnið seg uppaftur á eitt heiðursmerkjapláss, har teir hava verið fyri tað mesta í ár. Eftir tveir ósgirar á heimavølli var tað umráðandi hjá B36 at fáa ein sigur í land, og tað eydnaðist. Við sigrinum fóru havnarmenn framvið bæði TB og HB upp á triðja pláss.

Gøtumenn eru hinvegin illa fyri á aftasta plássi. Fýra dystir eru eftir, og GÍ skal helst hava ein sigur frá einum av hesum dystunum.

GÍ – B36 2-6 (2-2)

1-0: Hans Erik Danielsen
1-1: Heðin Joensen
2-1: Marek Wiegel
2-2: Ragnar Poulsen
2-3: Tórálvur Poulsen
2-4: Helgi Justinussen
2-5: Páll Horn
2-6: Mortan Johannesen